**DAGSINS MEINING**

# Skelkur fyri føroyska samfelagið

Tað fór sum ein skelkur gjøgnum føroyska samfelagið, tá tað hósdagin frættist, at 18 sjúkrasystrar hava sagt upp á Landssjúkrahúsinum. Ikki færri enn 18 sjúkrasystrar siga, at nú er nóg mikið. Nú orka tær ikki halda fram at renna og renna, tí deildin er undirmannað, og henni vantar fleiri starvsfólk.

Hesar sjúkrasystrar hava síðani í vár gjørt vart við, at deildin er undirmannað. Tær hava skrivað brøv og tær hava havt fundir, men tað hevur verið sum at sletta vatn á gás. Leiðslan er ikki samd við tær um, at deildin er undirmannað. Og leiðslan lat heldur ikki við seg koma, tá freistin fyri at fáa viðurskiftini í rætt lag var úti, og tær boðaðu frá, at fekk deildin ikki betri umstøður, merkti tað uppsagnir.

Onkur vil kanska halda, at hetta er grenj og at sjúkrasystrarnar eru ómøguligar. Men hesar sjúkrasystrar eru komnar til ta niðurstøðu, at tær kunnu ikki røkja tær grundleggjandi uppgávurnar í sjúkrarøktini: at varðveita lív, at linna líðing og fremja heilsu. Og tá tær ikki kunnu tað, ja, so taka tær seg aftur. Henda niðurstøða vísir, at hesar sjúkrasystrar hava stóra virðing fyri starvi sínum og sjúkrarøktini.

Tað sama kann ikki sigast um myndugleikan, sum hevur ábyrgdina av hesum. Og tað er fyrst og fremst Almanna- og heilsumálastýrið og Føroya Landsstýri. Í kreppuárunum varð spart á øllum økjum í samfelagnum, eisini innan heilsuverkið, men tað skiltu øll, tí tá var eingin peningur. Nú er støðan ein heilt onnur. Landskassin hevur havt stórt avlop á hvørjum ári, men á hvørjum ári er heilsuverkið meira ella minni pínt. Vilji hevur hvørki veriðat normera tað neyðuga starvsfólkatalið ella keypa neyðuga útgerð og tól.

Landsstýrið verjir seg við at siga, at ongatíð áður er so nógv sum nú brúkt til skúla-, heilsu- og almannamál. Hetta er nakað tvætl, tí útrokningar heilsuverkið hevur gjørt vísa, at síðani heildarveitingin varð sett í verk er heilsuverkið afturúrsiglt við meiri enn eini milliard tilsamans. Víst verður bygt upp í Landssjúkrahúsið, og eisini skal tað gerast í stand, men vit hava samstundis ta sannroynd, at játtanin til eitt nøktandi heilsuverk er ov lítil. Og hesum hevur landsstýrið ábyrgdina av.

Øll vilja hava eitt gott og framkomið heilsuverk her á landi, so fólk kenna seg trygg. Hetta er tann grundleggjandi spurningurin. Men fólk kenna seg ikki trygg, tá tey vita, at sjúkrahúsini eru so undirmannað, at fólk ikki kunna virka nøktandi og eftir síni sannføring, og at tól ikki verða útvegað. Men hetta leggur fullveldislandsstýrið vertin á – og sendir í staðin 366 milliónir krónur av landinum!

Hesar uppsagnirnar eru so álvarsamar, at kendi landsstýrið sína vitjanartíð, hevði landsstýrið og Almanna- og heilsumálastýrið á kreppufundi loyst støðuna, áðrenn uppsagnirnar komu á borðið. Men tað gjørdi landsstýrið ikki.

**Sosialurin**

# Àhugavert fólkatingsval



**Thomas Arabo**

Úrslitið av fólkatingsvalinum gjørdist, ikki heilt óvæntað, at sambandsflokkurin og tjóð-veldisflokkurin fingu hvønn sín mann á fólkating.Eftir mínum tykki ikki ein serliga heppin samanseting,men veljarin hevur talað og veljarin hevur altíð rætt,lat tað standa fast.

Vanligt er at teir, ið fáa fólkatingsumboðini verða mettir sum vinnarar av valinum.

Soleiðis er ikki hesufer(!).

Sambandsflokkurin var so avgjørt tann stóri vinnarin og tað má vera hugaligt hjá nývalda formanninum at fáa eina slíka byrjan.

Tjóðveldisflokkurin má hinvegin sigast at vera tann stóri taparin, sæð í mun til forvantningarnar, íð vóru. Sjálvur haldi eg at fulveldisbylgjan hevur »toppað«. Flokkurin hevur kasta allan sín indentitet í loysingina og har eru so 24% av veljarafjøldini, íð eru samd í hesum.

Tá íð eg sigi hetta við identitetinum, so er tað millum annað tí eg veit um eina kanning ímillum nakrar ungar veljarar har hesir mettu flokkin stórt sæð at hava eitt høvuðsmál og tað var loysing og mettu hann sum høgravendan loysingarflokk.

So her verður sanniliga brúk fyri fólkatingslønini hjá Tobba at kunna um hvat flokkurin stendur fyri annað enn loysing.

Sjónvarpstjakið aftan á valið har flokksformennirnir luttóku var sannuliga eisini áhugavert. Løgmaður kunngjørdi í veruleikanum, at hann nú hevði slept loysingakósina hjá Tjóðveldisflokkinum og vildi hava semju við hinar báðar flokkarnar um eina sjálvstýriskós. Hann fær kanska møguleikan til hettar aftan á eitt val.

Nú dámar mær ógvuliga væl okkara løgmann og tað hevur ofta undrað meg at hann í hesum valskeiðinum hevur haft eina greiða loysingar kós. Allir fólkaflokksformenn tey seinastu 50 árini hava roynt at gingið eina sjálvstýrisleið við stig fyri stig loysing alt eftir umstøðunum. Hugsi eisini at vanligi fólkaflokksveljarin er sjálvstýrisfólk og ikki loysingarfólk. Hugsi at her liggur ein partur av orsøkini til veika valurslitið hjá fólkaflokkinum.

Annars hevur tað neyvan hjálpt uppá »humørið« hjá fólkaflokksveljarunum innan handilsvinnuna at løgmaður hevur sent gott hálvtfjórhundrað milliónir árliga niður aftur til Danmarkar. Peningur sum danir vóru sátmálabundnir at gjalda til munandi oljuinntøkur koma kanska um eini 8-10 ár.

Fáa vit okkurt bakkast innan tað tíð so merkir tað helst at peningur skal takast inn í landskassan og harvið minkandi peningaumfar.

Og slíkt fær fyrst og fremst avleiðingar fyri handilsvinnuna.

# Vágs Javnaðarfelag - Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag

**Vágs Javnaðarfelag hevur hildið aðalfund 10.11.2001. Nýggj nevnd varð vald, og hevur hon skipað seg soleiðis:**

Formaður: Ebba Vágsheim
Næstformaður: Kaj Tausen
Skrivari: Eydis Kjærbo
Kassameistari: Lív Østerø
Nevndarlimur: Kirsten Strøm Bech
Eykalimir: Esther Suðuroy Karin Strøm.

Vágs Javnaðarfelag hevur limir úr øllum bygdunum í syðru helvt av oynni, og í tí sambandinum kom uppskot um at broyta navnið Vágs Javnaðarfelag til Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag. Hetta varð einmælt samtykt.

Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag er sera takksamt fyri undirtøkuna til fólkatingsvalið. Limirnir gjørdu eitt sera gott arbeiði undan valinum og tað svaraði seg aftur í úrslitinum.

Suðuroyar Syðra Javnaðarfelag fer við hesum at takka øllum teimum, sum stuðlaðu flokkin so dyggiliga til løgtingsvalið.

# Gudstænasta fyri insestoffur

GUDSTÆNASTA
*Stefan í Skorini*

Leygardagin 1. desember kl. 19.30 verður ein øðrvísi gudstænasta í Vesturkirkjuni í Havn. Henda gudstænasta ber navnið rósugudstænasta. Hetta er ein gudstænasta, sum verður hildin fyri teimum, ið hava verið úti fyri insest og kynsligum ágangi. Hon er eisini fyri familjum teirra og teimum, ið vilja vísa sína samkenslu.

Fyrireikararnir siga samstundis, at teir ikki gloyma teir ella tey, ið hava framt slíkan ágang. Tað er eisini rúm fyri teimum á hesi gudstænastuni.

Henda serstaka gudstænastan verður kallað rósugudstænasta, tí rósan er ein ímynd av kærleika og av Jesusi. Tann illgerð, misnýtarin hevur gjørt, kostaði Guds soni lívið, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

– Við hesi gudstænastu vilja vit ásanna, at samfelagið og kirkjan hava verið tigandi. Kirkjan boðar umsorgan og fyrigeving, men hetta hava vit farið alt ov lætt um við tí úrsliti, at vit ikki hava tikið offrini í álvara, siga stigtakararnir.

– Alt ov skjótt hava offrini fingið at vita, at tey skulu læra seg at fyrigeva og gloyma tað, sum hent er, meðan sárini bløða víðari.

Undir gudstænastuni er møguleiki at fáa forbøn. Eftir gudstænatuna verður ábit og samtala á Tórshavnar Sjómansheimi.

Tað er felagsskapurin KRIS í Føroyum við Hans Eiler Hammer sóknarpresti, sum skipar fyri gudstænastuni.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Hjá tínari rósu gert tú mun

**Teir 20 næmingarnir, sum nú hava fingið prógv á Almanna- og heilsuskúlanum á Tvøroyri, hava sanniliga stríðst fyri sakini. Hetta eru fyrstu heilsuhjálpararnir, sum hava fingið útbúgving í Føroyum**



*Hetta er ein søgulig mynd: teir fyrstu heilsuhjálpararnir, sum hava fingið útbúgving í Føroyum. Aftast frá vinstru eru tey: Susanne Høgh Olesen, skúlaleiðari, Sigrun Magnussen, Runavík, Arndis Nicolajsen, Skopun, Sonja Hammer, Syðrugøta, Sólrun Lisberg, Sumba, Anna Múller, Kvívík, Kerstin Jacobsen, Klaksvík, Erna Hovgaard, Tórshavn, Eydna Johansen, Sandavágur, Johanna Fløtt, Eiði og Helena Berthelsen, Strendur og í svartari blusu, Jórun Petersen, lærari*
*Sitandi frá vinstru: Hildigarð Djurhuus, Fuglafjørður, Tonny Jacobsen, Tórshavn, Hildigarð Jacobsen, Tvøroyri, Selma Gullaksen, Klaksvík, og Aleth Blåsvær, Tórshavn.*
*Húkandi frá vinstru: Jørghild Eið, Vágur, Súsanna Nolsøe, Dalur, Judith Árnastein, Hoyvík, Gurli, Høgnesen, Vestmanna, Judith Árnastein, Klaksvík og Beinta Mohr Leo, lærari*

– Hjá tínari rósu gert tú mun.

Við hesari heilsanini frá skúlanum, fingu teir fyrstu heilsuhjálpararnir á Almanna- og heilsuskúlanum á Tvøroyri, prógv síni handaði í gjár.

Og heilsanin frá skúlanum skal sjálvandi skiljast so, at rósan eru tey viðskiftafólk, sum hvør einstakur heilsuhjálpari fær, nú tær nú eftir lokna útbúgving fara aftur hvør í sitt herðashorn at vera heimahjálp.

Hetta var av sonnum ein søguligur dagur í føroyskari skúlasøgu og føroyskari heilsurøktarsøgu, tí hetta eru teir fyrstu heilsuhjálpararnir, sum fáa útbúgving í Føroyum.

Teir 20 næmingarnir fóru undir útbúgvingina í mai, tá ið skúlin, eftir mikið rumbul, læt upp á Tvøroyri.

Hetta eru alt konur, ið hava verið heimahjálp í nøkur ár. Og av tí, at tær hava drúgvar royndir, fáa tær tað mesta av starvsvenjingini eftirgivið og tað styttir útbúgvingina niður í 26 vikur. Annars tekur útbúgvingin eitt ár.

– Hetta er nakað spildurnýtt í Føroyum. Og tað er altíð hart at bróta upp úr nýggjum. Men sum heild, haldi eg, at tað hevur gingið avbera væl, sigur skúlaleiðarin, Susanne Høgh Olesen.

Í hvussu so her hava próvtøkurnar gingið sera væl, tí tær hava fingið 8,9 í miðal.

Tað má sigast at vera frálíkt, tá ið vit hugsa um, at hetta eru tilkomnar konur, og summar av teimum hava ikki sitið á skúlabonki, síðani í teimum døgum, tá ið tað var vanligt at børn á bygd í Føroyum bara gingu í skúla aðruhvørja viku.

– Tær hava stríðst fyri sakini, sigur skúlaleiðarin, tí tær eru ikki vanar at lesa skúlabøkur.

Hon sigur, at skúlin hevur havt samstarv við ein sama slag skúla í Bornholm fyri at tryggja, at tað fakliga støðið skuldi vera fult á hædd við tað í hinum norðurlondum.

Somuleiðis hevur skúlin havt ymsar próvdómarar til hvørja próvtøku fyri at fáa eina so fjølbroytta meting av støðuni, sum gjørligt.

– So tað er onki at ivast í, at hetta prógvið er fult á hædd við støðið í hinum Norðurlondunum, sigur skúlaleiðarin á Tvøroyri.

## Hátíðarhald í gjár

Á miðdegi í gjár var móttøka og hátíðarhald á skúlanum. Hetta var eftir, at blaðið fór til prentingar, men har var ætlanin, at Óli Holm, landsstýrismaður í skúlamálum skuldi halda røðu. Almanna- og heilsuskúlin er undir somu høvuðsleiðslu sum sjúkrasystraskúlin í Havn og skúlastjórin, Bergljót Ihlen skuldi eisini halda røðu, áðrenn hon handaði teimum nýggju heilsuhjálparunum prógvini.

Frá skúlanum skuldu næmingarnir fáa eina lítla gávu. Tað er bókin um tann lítla prinsin, sum tær fáa við eini reyðari rósu.

– Í mínari fráfaringarheilsu fari eg at lesa tað brotið, har prinsurin hevur sæð ein urtagarð, fullan av rósum og er ógvuliga forharmaður, tí hann helt, at hansara rósa var nakað heilt fyri seg.

– Hjá tykkara rósu gera tit mun, endar Susanne Høgh Olesen.

Í bókini, sum Heilsuhjálpararnir fáa, standa hesi orðini eisini sum ein heilsan til teir, saman við góðynskjum frá lærarunum.

Leiðarin fyri heimarøktini í Suðuroy, Jastrid Nielsen, fer eisini at halda røðu.

Teir nýklaktu heilsuhjálpararnir fara eisini at siga nøkur orð, tey hava eisini yrkt ein sang og fara at skipa fyri øðrum undirhaldi.

## Aftur næsta ár

Eitt annar flokkur av heilsuhjálparum er í starvsvenjing í løtuni. Hetta er ein flokkur av næmingum, sum ongar arbeiðsroyndir hava, og sum tí skulu ganga í skúla í eitt ár. Tann flokkurin byrjaði í september og verður liðugur næsta heyst.

Næsta flokkur av heimahjálpum, sum skulu skúlast, byrjar í apríl og so byrjar aftur ein í oktober.

Ætlanin er at hava tveir flokkar av heimahjálparum til skúlingar um árið, fyrri flokkurin skal byrja í apríl og seinni flokkur í oktober. Tað verða 20 næmingarnir í hvørjum flokki.

Ætlanin var eisini at útbúgva heilsurøktarar á skúlanum. Hetta er ein útbúgving, sum tekur næstan tvey ár afturat útbúgvingini sum heilsuhjálpari. Men hesa útbúgving er ongin møguleiki at fara undir sum er, tí tað er skúlin ov lítil til.

Ein fortreyt fyri at fara undir tað útbúgvingina, er tí, at nýggjur skúli verður bygdur, sigur Susanne Høgh Olesen.

Hon sigur, at hon fær nógvar fyrispurningar um, nær tann útbúgvingin byrjar, men tað fær hon onki sagt um.

Umframt Susanne Høgh Olesen, eru tveir lærarir á skúlanum, Kostráðgevarin, Beinta Mohr Leo, úr Vági og fysioterapeuturin, Jórun Petersen, av Tvøroyri.

*At veita andadrátt er ein partur av útbúgvingini hjá heilsuhjálparunum. Her er tað Hidigarð Jacobsen á Tvøroyri, sum roynir seg. Hon var tann allarfyrsti heilsuhjálparin, sum fekk prógv í Føroyum*

